# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Djokovic basti aftur Nadal

Serbiska tennisstjørnan Novak Djokovic vann í dag finaluna í Italian Open-kappingini í Rom, tá hann fyri fjórðu ferð í ár vann eina finalu ímóti spanska Rafael Nadal. Úrslitið av dystinum teirra millum var 6-4, 6-4 til Djokovic. Hetta var tann 37. sigurin hjá Novak Djokovic í ár, og hann verður nú mettur at vera tann, sum hevur bestu møguleikarnar at vinna Franch Open. Samstundis fer serbin at nærkast gamla metinum hjá amerikanaranum John McEnroe, sum vann teir fyrstu 42 dystirnar, sum hann spældi í 1984. Finaluna í Rom hjá kvinnunum vann russiska Maria Sharapova 6-2, 6-4 á Samantha Stosur úr Avstralia.



# Simonsen er til reiðar

**FÓTBÓLTUR** Allan Simonsen, fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, boðar frá, at hann er til reiðar at vera fótbóltsvenjari aftur

Uni Holm Johannesen

Allan Simonsen, sum seinastu 10 árini hevur búð í Barcelona, flytir nú aftur til Danmarkar. Tað hevur samstundis við sær, at hann tekur fegin á seg eitt starv í donskum fótbólti.

– Eg gleði meg til stórar avbjóðingar í ítróttarheiminum, og læra av mínum royndum, sigur Allan Simonsen við sporten.dk.

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin flytir til Vejle, har hann er uppvaksin. Allan Simonsen settur í samband við venjarastarvið í VB Kolding, men hann vísir tí aftur.

*uni@sosialurin.fo*

# HB vísir gitingunum aftur



**FÓTBÓLTUR** Jan Otto S. Holm og Sigfríður Clementsen vísir aftur søgunum, at Sigfríður Clementsen fer at loysa av Julian Hansen í venjarasessinum

Uni Holm Johannesen

– Vit hava eitt ungt lið, og tað eru framvegis 57 stig eftir at spæla um. Vit hava ikki viðgjørt møguleikan at skifta venjaran. Tað er eingin orsøk til tað.

Tað sigur Jan Otto Holm, sum er formaður í HB. Verandi føroyameistararnir hava fingið 10 stig av 24 møguligum higartil. Eftir lemjandi 1-4 tapið í slagnum um høvuðsstaðin í gjár, vóru søgur um, at Sigfríður Clementsen og Magni Mohr, sum fyrr hava havt evstu ábyrgdina av B36 og EB/Streymi, fara at standa á odda fyri HB næstu mánaðirnar.

Sigfríður Clementsen sigur, at hann hevur einki hoyrt frá nevndini í HB.

– Eg havi heldur ikki hug at gera viðmerkingar um eitt starv, sum ein annar hevur, sigur hann.

Jan Otto Holm staðfestir, at HB ætlar ikki at skifta venjaran.

– Eg veit einki um hasar søgurnar, og eg kann ikki annað enn vísa teimum aftur, sigur hann.

*uni@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið vóru okkara menn aftanfyri. Men ein og hvør ótti fyri, hvussu liðið skuldi reagera upp á hetta, varð beindur til viks, tá vit snøgt sagt hølvaðu HB av í dag

*www.b36.fo*

- Heimasíðan tímur ikki at vassa í tí veruleikanum at vit vóru gott og grundiga smurdir av í dag. Øll í og rundan um liðið eiga at verða flov og kedd at hesum grátuliga veruleikanum.

*www.hb.fo*

Trý stig komu á kontuna, og avrikið er harvið sjálvandi góðkent. Liðið riggar væl í løtuni, og vit liggja í rætta enda á stigatalvuni. Næstu ferð er ÍF á skránni á heimavølli.

*www.vikingur.fo*

Sum heild kann sigast, at dysturin var javnur, har KÍ hevði minst líka nógv spæl og møguleikar sum Víkingur, men Víkingur tóku av, tá KÍ verjan svav í fyrra hálvleiki, og einsamalla málið frá Hanusi Jacobsen var einasta málið, sum tryggjaði Víkingi tey 3 stigini.

*www.nordlysid.fo*

Tað var ein stórur lætti hjá B68 leikararunum og teirra viðhaldsfólki, tá dómarin Georg N. Rasmussen bríkslaði fyri seinastu ferð. Fyrsti sigurin á heimavølli er komin til hús, og fyri fyrstu ferð, fekk B68 stig, har mótstøðuliðið ikki fekk ein mann útvístan.

*www.b68.fo*